# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Hann eigur ikki annað gull enn ringin, sum hann hevur á fingrinum*
*(verjin hjá Pinochet)*



*Danny Harold Rolling myrdi fimm ungar kvinnur á heysti í 1990. Í gjárkvøldið bleiv hann tikin av døgum.*

# – Hetta havi eg uppiborið

**Fyri sekstan árum síðani myrdi Danny Harold Rolling fimm ungar kvinnur. Á midnátt í gjárkvøldið bleiv hann avrættaður.**

Alt USA var skakað á heysti í 1990, tá ein ókendur drápsmaður myrdi fimm ungar kvinnur í statinum Florida. Felags fyri kvinnurnar var, at tær gingu á lærda háskúlanum í Gainsville. Felags fyri morðini var, at líkini høvdu fingið eina óhugnaliga viðferð, og at nakrar av kvinnunum høvdu verið kynsliga misnýttar, áðrenn tær vórðu myrdar.

Nakrar mánaðir aftan á morðini eydnaðist tað løgregluni at finna drápsmannin, og DNA-kanningar staðfestu, at hann var tann seki. Maðurin æt Danny Harold Rolling, og í rættinum fýra ár seinni játtaði hann at hava beint fyri teimum fimm kvinnunum. Eingin ivi var um revsingina. Danny Harold Rolling bleiv dømdur til deyða. Í einari samrøðu við AP tá segði hann:

– Hetta havi eg uppiborið, men eg vil liva.

Á midnátt í gjárkvøldið bleiv dómurin fullførdur við einari eitrandi sproytu. Tað hendi í sama rúmi, sum tann kendi hópdrápsmaðurin Ted Bundy bleiv avrættaður í í 1989. Eisini hann myrdi ungar kvinnur, men eingin veit við vissu, hvussu mangar tær vóru. Sjálvur játtaði hann at hava verið fleiri enn 70 kvinnum at bana.

# Fjaldi 9 tons av gulli

Myndugleikarnir í Kili vilja vera við, at fyrrverandi einaræðisharrin Augusto Pinochet hevur fjalt 9 tons av gulli í Hongkong.

Fleiri av teimum stóru bløðunum í Kili leggja nú fyrrverandi einaræðisharran undir at hava stolið 9 tons av gulli frá tjóðbankanum og sent tað av landinum. Verjin hjá Pinochet avsannar tíðindini og sigur, at Pinochet eigur ikki annað gull enn ringin, sum hann keypti, tá hann bleiv giftur.

Men hetta er eftir øllum at døma ikki allur sannleikin. Kilski uttanríkisráðharrin, Alejandro Foxley, váttar fyri bløðunum La Natión og El Mercurio, at stjórnin hevur leingi verið vitandi um, at Pinochet hevur nógv gull liggjandi í goymlsuni hjá bankanum Hong Kong and Shanghai Banking. Sum skilst er gullið einar 900 milliónir krónur vert.

Ákæruvaldið í Kili hevur leingi arbeitt við at skráseta ognirnar hjá fyrrverandi einaræðisharranum, men tað hevur víst seg at vera trupult, tí eftir øllum at døma flutti hann pening og annað av landinum, áðrenn hann fór frá. Gullið í bankanum í Hongkong er partur av hesum, og nú hevur kilska stjórnin kravt, at hald verður lagt á gullið í bankanum, skrivar AP.



*Augusto Pinochet. Hevur hann fjalt 9 tons av gulli í einum banka í Hongkong?*



*Russisku myndugleikarnir hava illgruna um, hvør myrdi Onnu Politkovskaja.*

# Nærkast drápsmonnunum

Russisku myndugleikarnir hava illgruna um, hvør myrdi tíðindakvinnuna Onnu Politkovskaja.

Myndugleikarnir ásanna, at teir vita ikki enn, hvør beindi fyri tíðindakvinnuni, men blaðið Kommersant skrivar, at myndugleikarnir leita eftir tveimum fyrrverandi løgreglumonnum, sum verða settir í samband við morðið. Teir báðir menninir eru eisini skuldsettir fyri brotsverk ímóti sivilfólki í Kekenia, skrivar blaðið.

Anna Politkovskaja var kend fyri sítt arbeiði at avdúka harðskap og ágang í Kekenia, og tað vakti ans um allan heimin, tá hon bleiv myrd í Moskva tann 7. oktober. Allastaðni bleiv morðið fordømt, og fleiri leiðarar kravdu, at russisku myndugleikarnir skuldu finna tann ella teir seku.

Sambært Kommersant hevur ákæruvaldið í Moskva sent fólk til Sibir at leita eftir teimum báðum fyrrverandi løgreglumonnunum. Tað er komið fram, at annar teirra sendi Onnu Politkovskaja hóttandi teldubrøv fyri fimm árum síðani.

Vladimir Putin, forseti, hevur fyrr fordømt morðið á tíðindakvinnuna. Í einari beinleiðis kjaksending í russiskum sjónvarpi í gjár bleiv hann spurdur um morðið.

– Tað almenna hevur skyldu til at kanna øll slík mál, sama um tað snýr seg um fólk í fjølmiðlaheiminum ella fíggjarheiminum, svaraði Putin uttan tó at nevna Onnu Politkovskaja við navni.

## STUTT SAGT

### Skal hitta Bush

Floksliturin tykist vera avgerandi fyri, hvør verður boðin at vitja George W. Bush, forseta í Hvítu Húsunum. Tað halda í hvussu er norskir fjølmiðlar, nú tað frættist, at Bush longu hevur boðið nýggja svenska forsætisráðharranum, Fredrik Reinfeldt, til Washington at vitja. Norski forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg, hevur harafturímóti ikki fingið nakra innbjóðing, hóast hann hevur sitið nógv longri í starvinum enn Reinfeldt. Svenski uttanríkisráðharrin, Carl Bildt, skal sambært summum fjølmiðlum hava latið eitt orð fella um, at Bush heldur ikki serliga nógv av teimum norðurlendsku sosialdemokratunum.

### Skutu eftir skipi

Týska verjumálaráðið vil vera við, at tvey ísraelsk stríðsflogfør skutu eftir einum týskum herskipi, sum helt vakt uttan fyri libansku strondina. Týsku skipini hava eftirlit við libanska sjóøkinum saman við herskipum úr fleiri øðrum londum. Sambært blaðnum Der Tagenspiegel var talan um tvey flogfør av slagnum F-16. Ísraelska hervaldið avsannar tíðindini og sigur, at einki ísraelskt flogfar hevur skotið eftir fremmandum herskipum úti fyri Libanon.

### Kann draga út

Í Danmark bíðar ákæruvaldið eftir at fáa at vita, um tann gamli danski nazisturin Søren Kam verður útflýggjaður úr Týsklandi til Danmarkar, har hann er skuldsettur fyri at hava skotið ein blaðstjóra undir seinna heimsbardaga. Eftir áheitan frá danska løgmálaráðnum tók týska løgreglan Søren Kam í september, men tann 12. oktober varð hann latin leysur. Nú hevur danska ákæruvaldið kravt at fáa hann útflýggjaðan, og sambært galdandi ES-reglum skulu týskarar svara kravinum í seinasta lagi tann 19. november. Men TV2 veit at siga, at týsku myndugleikarnir eru komnir við ábendingum um, at tað er ikki víst, at teir fara at halda tíðarfreistina í hesum førinum. Tí kann málið draga út.